


## Sum kundi hjá Skipafelagnum hevur tú atgongd til størsta flutningskervi í Norður Atlantshavi.

Heimurin tódnar, verður sagt, og tað av góðum grundum. Skipafelagið kann í dag, sum partur av største rutuneti í Norður Atlantshavi, bjóða eina sterkari tænastu innan flutning og logistikk, enn nakar hevur sæð fyrr á okkara leiðum.

Føroyskar fyritøkur fáa frá Skipafelagnum eina flutningstænastu, ið lyftir teir handilsligu møguleikarnar upp á eitt nýtt stig. Nú fæst hendur á øllum hugsandi handilsvørum úr øllum heraðshornum, og samstundis er tað vorðið bæði ómakaleysari og munadyggari hjá útflutningsvinnuni at veita sínum viðskiftarum vøruna í besta standi og til ásetta tíð.

Okkara samband við Europa, Amerika og Asia er nú so gott, at talan er um verulig frambrot fyri alla vinnuna. Føroyingar, ið vilja hava vørur hendan vegin úr eitt nú Rotterdam, London ella New York, kunnu við Skipafelagnum fáa síni ørindi avgreidd bæði smidliga og skjótt. Og hjá teimum, ið vilja útflyta vørur til eitt nú europeiska meginlandið, Stórabretland ella Kina, er tað lagamanni at gagnnýta okkara stórfingna kervi.

Líka so føroyskt sum altíð, meira altjóða enn nakrantíð. Tað er sannleikin um Skipafelagið Føroyar, nú allir viðskiftarar okkara kunnu gleðast um betri tænastu enn nakrantíð frá einum styrktum og globaliseraðum Skipafelag.

Vælkomin at vitja www.faroeship.fo ella tosa við okkara sølufólk á 34 90 00.

**Nýggj handilshøvi hjá altjóða Føroyum.**

SKIPAFELAGIÐ

REPROZ